

## Eyðfinnur við bók um skattarætt

Fríggjadagin klokkan 15 verður bókin »Føroyskur Skattarættur«, sum Eyðfinnur Jacobsen, advokatur, hevur skrivað, løgd fram í Miðlahúsinum. Bókin er ætlað til undirvísing á Handilsskúlum og Fróðskaparsetri, men kann eisini vera hent handbók hjá grannskoðarum, advokatum og øllum øðrum, sum fáast við skattafaklig evni. Bókin er vaksin fram úr undirvísing á merkonomskeiðum, sum rithøvundurin javnan hevur staðið fyri í eini 25 ár. Umframt at undirvísa í evninum, hevur Eyðfinnur Jacobsen í starvi sínum sum advokatur brúkt ein stóran part av arbeiðsorku síni til at veita einstaklingum, stovnum og virkjum úti og heima ráðgeving um føroyskan inntøkuskatt. Arbeiðið at skriva bókina byrjaði av álvara fyri um leið fimm árum síðan, tá ið samtakið av loyvishavarum at leita eftir kolvetni á føroyskum havleiðum undir heitinum The Faroes Partnership við Amerada Hess á odda veitti Eyðfinni stórfingna peningaupphædd, sum gjørdi tað møguligt at leggja annað arbeiði til viks.

**BYGNINGAR**

*Almennir bygningar eru í so syndarliga ringum standi, at tað eru allar orsøkir til at rópa varskó, sigur Ewald Kjølbro, leiðari á bygningsdeildini hjá Landsverki*



**Nógvir bygningar eru eisini reinar brandfellur, tí teir eru ikki brunatryggjaðir eftir forskriftunum.**

## Brúka bara 45 krónur

Vanliga verður sagt, at skulu bygningar ikki forfella, skal tað almenna brúka einar 160 krónur um árið til røkt fyri hvønn fermetur.

- Men hesi seinastu 12 árini hevur tað almenna í Føroyum bara brúkt 45 krónur í miðal til at halda almennar bygningar fyri.

Á fíggjarlógini í ár er talið hækkað upp í einar 90 krónur fyri fermeturin, tí ein serlig játtan er latin til at umvæla almennar bygningar fyri í eini roynd at skapa arbeiði.

- Men tað er framvegis langt frá minstamarkinum, staðfestir Ewald Kjølbro.

vit mangan, at vit eru langt afturút, hvat viðvíkur at lúka krøvini frá brunaumsjónini.

### Stór innspræning

Ewald Kjølbro sigur, at skal tað eydnast at fáa viðurskiftini í rættlag og fáa almennar bygningar í vanliga góðan stand, krevst ein munandi, fíggjarlig innspræning hesi næstu heilt fáu árini.

Hvussu stór hendan innspræningin skal vera, hava tey ikki roknað út. Men talan kann skjótt verða um um hundraðtals milliónir.

Hinvegin er Landsverk nú farin í holt við at skráseta allar almennar bygningar fyri at vita, hvørjum standi teir eru í.

Men harumframt krevst so, at árliga játtanin til viðlíkahald, verður hækka uppí í einar 30 millónir um árið fyri at varðveita bygningarnar á einum vanligum viðlíkahaldsstøði.

Hann sigur, at verða bygningar ikki røktir, slepst ikki undan at trupulleikin veksur og tað er so skjótt, at hann blívur so stórur, at hann letur seg ikki umvæla.

- Tá er neyðugt at skifta út ella at byggja nýtt og sostatt er væntandi viðlíkahald eitt tvíeggjað svørð, sum verður nógv dýrari at fáa bilbukt við í síðsta enda, verður hond ikki tikin um trupulleikarnar so hvørt teir vísa seg.

- Tá er talan ikki longur um eina umvæling, men um endurbygging og tað kostar munandi meir og í longdini er sostatt ongin sparing í at halda aftur í viðlíkahaldsútreiðslunum, tvørtur ímóti.

aki@sosialurin.fo

## Fáa onki næstu árini

Hóast Ewald Kjølbro staðfestir, at játtanin til at røkta almennar bygningar fyri, bara er ein brotpartur av tí, sum hon átti at verið, bendir onki á, at ætlanin er at raðfesta hetta tey næstu árini.

Tvørtur ímóti er ætlanin at skerja játtanina til Landsverk 3,4 milliónir næsta ár

Sambært frágreiðingini, sum varð løgd fyri Løgtingið saman við uppskotinum um játtanarkarmin, sæst, at onki er avsett á grein 15 til viðíkahald av almennum bygningum hesi næstu fimm árini

# 233 almennir bygningar

Tað er Landsverk, sum umsitur almennar bygningar og ein uppgerð hjá stovninum vísir, at tilsamans eigur landið heilar 233 bygningar um alt landið.
Landafrøðiliga standa bygningarnir soleiðis

| Staður | Bygningar í tali |
|---|---|
| Suðuroy: | 27 |
| Sandoy: | 3 |
| Vágar: | 3 |
| Mykines: | 1 |
| Suðurstreym: | 130 |
| Norðstreym: | 22 |
| Eysturoy: | 10 |
| Norðoyggjar: | 18 |
| **Tilsamans** | **214** |

Umframt hesar bygningar eigur landið eisini Biskupsgarðin og 18 prestagarðar kring landið.
Sostatt eigur landið 233 bygningar tilsamans ymsastaðni í landinum og samanlagt hava hesir bygningar eina gólvvídd upp á 158.524 fermetrar.
Men harafturat varðar landið eisini av ymsum sjálvognarstovnum og tá ið tað almenna leigar bygningar til almennar stovnar ella almenna umsiting, er tað viðhvørt ein partur av sáttmálanum, at landið skal betala fyri at halda bygningarnar.
Soleiðis er talan um rættiliga nógvir bygningar tilsamans, sum tað almenna skal betala fyri at at halda og er talan um bygningar við eini góvvídd upp á tilsamans 183.183 fermetrar, sum tað almenna hevur ábyrgdina av at røkja.